# BØNARLØTAN

MAI 2022 37. árg.

**1. Sunnudagur** *Orðt. 8.1-21*



*Nýggj bíbliutýðing verður til.*

## SENEGAL, Tongia
## Lív Poulsen

Vónandi verður Matteusevangeliið rættlisið í mai saman við bygdarfólki fyri at vita, um tey skilja tað. Wendy og Erik eru í USA og koma ikki aftur fyrrenn í okt. Sólpanelini eru ikki komin enn, tískil er trupult at fáa vatn í løtuni. Kvinnurnar møtast eina ferð um vikuna heima hjá mær at lesa úr Bíbliuni og biðja saman. Ungi umsetarin byggir nú hús.

## KRINGVARPIÐ

1. mai  sjónvarpsandakt, Símun P. á Torkilsheyggi
13. mai  kl. 16 sjónvarpsmøti úr Hebron, Leirvík

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 21 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Mánadagur* — *Heb. 10.19-39*

### VENESUELA, Puerto Ordaz
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen



Fyrstu vikuna í mai er Nurimar í Kolumbia í arbeiðsørindum. Alt lærutilfarið, sum verður brúkt til ættarbólkarnar, er endurnýggjað, og allir trúboðararnir skulu á skeið miðskeiðis í mai. Vit verða í Føroyum í juni-aug.

## *3. Týsdagur* — *Orðt. 8.22-36*

### ZAREPTA

Familjulegan fyri fólk, ið bera brek, verður frí. 13-15. mai. Høvuðsreingerð verður 15-21. mai. Síðan verða seks familjulegur 22. mai til 24. juni. Tørvur er á hjálparfólki.



### FØROYAR
### Atlantic Mission, Juvel II
### Birgit og Svenning av Lofti
### – Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 12, Ester 11, Samuel 7



**DANMARK, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 14, Andreas 12, Kristina 11**
Tað var stimbrandi fyri okkum at vera á samfelagsmøtum í Hvalba á páskum. Niels Pauli vitjar í Kristnastovu fyrru helvt av mai, har hann m.a. hevur bíbliutímar ley. 7. mai.



**Sólva og Jákup Hansen**
Biðið, at Harrin leggur onkrum á hjarta at hjálpa til í arbeiðnum her í Kristnastovu, um bert í styttri tíð. Eisini er ymiskt viðlíkahaldsarbeiði at gera í vár og summar. Hevur onkur hug at geva nakrar dagar ella meir, so skrivið ella ringið: hansen.jakup@gmail.com, Sólva: +45 27538416, Jákup: +45 27538461.



**Susan og Øssur Berghamar**
Mikudagin 4. mai kl. 15 verður seniorsamkoma í Kristnastovu. Gott at hava óskert samband og samfelag aftur við eldra ættarliðið. berghamar@kristnastova.dk

**Odense, Árni Helmsdal**
Vit hava kristiligan fund í Rosenlunden 15 fyrsta fríggjakvøld í mánaðinum kl. 20. Vónandi fáa vit betri samband við fleiri fastbúgvandi føroyingar í og kring Odense. +45 30251373
⋆ Í dag fyllir Noah Flanagan 13 ár

## *5. Hósdagur* — *Sálmur 23 og 24*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Eitt ár er nú farið, síðani okkara elskaði sonur Christopher so knappliga varð kallaður heim í dýrdina. Saknurin er stórur og serliga fyri elskaðu børn hansara. Takk fyri áhaldandi forbøn.

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

## *6. Fríggjadagur* — *Heb. 11.20-40*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Eg skal kanna nakað av umsetingararbeiðnum í mai og juni, meðan eg eri í Skotlandi. Biðið fyri umsetingartoyminum í Oaxaca, sum Sue samstarvar við.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15,**
**Emma Grace 14, Jónatan 12,**
**Markus 10, Evita 7, Joy 5**

Biðið fyri ungdóminum í samkomuni, at tey líta á Harran av øllum hjarta og ikki á sítt egna vit, og at tey kenna Hann á øllum leiðum sínum (Orðt. 3.5-6).

⋆ Í dag fyllir Evelyn Poulsen 2 ár

## *7. Leygardagur* *Josva 1.1-18*



**PAPUA NÝGUINEA**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Eg undirvísi á netinum í Filippibrævinum á bíbliuskúlanum hjá NTM. Sum liður í trúboðaravenjingini skulu næmingarnir búgva í tjaldi í 5 vikur uttan nýmótans hentleikar umframt at læra fremmand mál, har eitt teirra er sorimimálið.

## *8. Sunnudagur* *Áp. 1.1-26*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**

Vit byrja nú aftur verkið millum rúsevnismisnýtarar eftir drúgvan korunusteðg. Vit brenna fyri hesi tænastu. Biðið, at Harrin leiðir okkum.

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 14**

Biðið fyri STEVN, møtum og heilsu okkara.

⋆ Í dag fyllir Terji í Prestgarði 10 ár

## *9. Mánadagur* *Josva 2.1-24*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 16, Lydia 5**

Samkoman í Skovlunde hevur hjálpt kristnari familju úr Ukraina, ið flýddi til Póllands, at koma til Danmarkar. Biðið, at vit sum samkoma veita dygga hjálp, at tey læra málið, fáa arbeiði og møguleika at standa á egnum beinum.

## *10. Týsdagur* *Sálm. 25*

### OM, LOGOS HOPE, TeenStreet

Vit fyrireika summarið 2022. Fólk kunnu fara á summartoymi til Norra, 16+ ár, 2-13. juli, og Bornholm, 18+ ár, 1-8. aug. TeenStreet, 13-17 ár, við hjálparfólkum og liðleiðarum verður í Spania 7-13. aug. Tilmeldingarfreistin er 10. mai. Føroyingar verða við til øll tiltøkini. Kunning á www.om.fo ella skriva til info.fo@om.org. Hanna Berghamar og Sámal Rasmussen eru við Logos Hope. OM Føroyar hevur bás á Atlantic Fair í Klaksvík 17-19. mai.

## *11. Mikudagur* *Josva 3.1-17*



### DANMARK, Kolding
### Jan og Anne Zachariassen

Vit hava havt koronu, men tæna nú aftur. At boða evangeliið á teknmáli er týdningarmikið fyri tey deyvu. Vit takka fyri ávøkst og signing, ið Harrin gevur.



### DANMARK, Hirtshals, Malta
### Anna og Hans Djurhuus

### DANMARK
### Glostrup Frikirke

Her eru fólk, sum hava ukrainskar røtur. Hesi hava á serligan hátt havt samband við flóttar úr Ukraina, og nøkur teirra koma á møtini. Sunnudag seinnapart er bønamøti á ukrainskum, sum fólk haðani sjálv standa fyri. Vit vóna, at Glostrup Frikirke kann vera ein varði á vegnum hjá hesum plágaðu menniskjum.

## *12. Hósdagur* *Sálm. 26*



### TURKALAND, Istanbul
### Annika og Stephen Everett

Ferðin eystanfyri gongur væl, og vit hava góðar samrøður við fólk. Nøkur vitjaðu samkomuna fyrstu ferð á páskum, meðan onnur byrjaðu at koma á jólum. Vit hava eisini hitt føroyingar í ymsum arbeiðsørindum. Til-takið á oynni herfyri varð væl vitjað. Vit góvu nógvar bøkur, nýggja testamenti og traktatir, og vit eggjaðu fólki at seta seg í samband við bíbliubrævaskeiðið.

## *13. Dýri biðidagur* *Josva 4.1-24*



### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Harrin leggur fólki á hjarta at hjálpa til við legunum. Tó vantar arbeiðsfólk at gera klárt til legurnar. Vit vóna, at eitt lið kann koma 22. mai, eitt annað 10. juni og so eitt í august. Summi arbeiði eru neyðug, onnur eru ynskilig. Nærri kunning frá Jóanes Norðberg: 222909 ella Páll Poulsen: 215181.

### GRØNLAND, Juvel II
### Gull-Britt og Karsten Hansen



Siglt verður av Klaksvík til Grønlands 21. mai og aftur til Føroya um 20. sept. Vit eru takksom, at alsamt fleiri grønlendingar eru við og taka ábyrgd. Biðið, at Harrin signar verkið og vekir áhuga millum yngri at boða grønlendingum evangeliið.

## *14. Leygardagur* *Áp. 3.1-26*



### GRØNLAND, Nuuk
### Naalakkap Jiisusip Oqaluffa
### Hans Sivertsen

Legurnar verða hesar: 30. juni til 5. juli, 7-12. juli, 14-19. juli og 21-26. juli. Brúk er fyri um 12 fólkum til legu 1 og 2. Til barna- og ungdómsleguna 3 og 4 er brúk fyri 12-15 hjálparfólkum. Okkum tørvar ung og eldri sum leiðarar umframt fólk til køkin, reingerð og umsjón. Hjún við børnum eru eisini vælkomin. Kunning og tilmelding hjá Sofus Gregersen: 771715 ella sofus.gregersen@gmail.com. Stórur áhugi er fyri bíbliuskeiðnum 24-27. juni.



### GRØNLAND, Qasigiannguit
### Solveig og Daniel Kinda

Minnist túrin til Ikerasak í summar. Vit fara norðureftir við Qaamaneq 11-21. juli.

## *15. Sunnudagur* *Josva 5.1-15*



### Elam Ministries, Evropa
### Margretha Højgaard Poulsen

Saman við ymsum samkomum í Evropa høvdu vit eitt gott 8-vikur netskeið við 100+ trúgvandi iranum og afghanum. Fleiri bíbliuskeið eru á skrá í Grikkalandi, Týsklandi og Onglandi.

### ÍRLAND, Global Serve International
### Guðrun og Ivor Tutty

## *16. Mánadagur* *Áp. 4.1-20*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Okkum tørvar vísdóm at vegleiða trúboðarar kring heimin. Biðið fyri børnum okkara, og at vit eru ein vitnisburður í grannalagnum.

**FØROYAR**
- **Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**
- **Unn og Jógvan Zachariassen**
- **Lis Zachariassen**
- **Annika og Poul Færø**
- **Anna og Óli Steinberg**
- **Maria og Jens Bech**



## *17. Týsdagur* *Josva 6.1-27*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 4, Timon 2**
Vit royna at skilja mentanina her í Kovol. Grannarnir eru fluttir, tí teir hildu, at grísar teirra vóru til ampa fyri okkum. Vit hava so eisini fingið okkum grís og hava nú aftur samband við grannarnar, hóast teir ikki eru vendir aftur enn.

**FØROYAR**
- **Else og Poul Johan Djurhuus**
- **Anna Maria og Rógvi Joensen**
- **Rutt og John í Skemmuni**
- **Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
- **Vanja og Svein í Prestgarði,
  Jenny 14, Svend 13, Terji 10, Petra 8**

## *18. Mikudagur* *Es. 11.1-16*

### ONGLAND, Birmingham, OM
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 16, Rebekah 14, Lydia 12**

Vit stuðla samverkafólki í Ukraina og í grannalondunum, sum hjálpa flóttafólki. Hetta bindur stóra arbeiðsorku hjá okkum. Craig fer í farloyvi frá OM í eitt ár. Hetta er stór broyting fyri familju okkara. Biðið, at hann finnur støðugt arbeiði og verður endurnýggjaður andaliga.

### ONGLAND, Cornwall
**Anna og David Rodda**



Jesusfilmurin skal ætlandi sýnast í fleiri saafibygdum. Síðani tosa vit við fólk um filmin og bjóða áhugaðum til samrøðu. Dubby heldur á at gera pod-casts, men hevur tørv á einum tøkningi at hjálpa sær. Vit leggja sangir á okkara YouTube-rás: https://www.youtube.com/user/DubbyRodda/videos. Biðið fyri sýningunum.

## *19. Hósdagur* *Sálm. 27*



### FRANKARÍKI, Nantes, OM
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah 8, Abigail 3**

Biðið fyri arbeiðnum at stovna nýggja samkomu - vit hava enn ikki funnið hølir. Vit ætla at vitja í Føroyum, men hava trupulleikar við innfararloyvi. Biðið, at málsviðgerðin at fáa innfararloyvi gongur skjótt og væl.

## *20. Fríggjadagur* *Róm. 9.1-13*



**TÝSKLAND**
**Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**

Ein familja við trimum børnum úr Sveis vil fara til Brasil at tæna í 4 ár á skúlanum fyri trúboðarabørn. Tað er ikki lætt at fáa innfararloyvi til Brasil, so biðið fyri teimum.



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 17, Trisha 10, Emma 5**

Vit verða í Føroyum frá juli og árið út. Vit fyrireika nú samkomuna her til tíðina, vit eru burturstødd, og flyta ymsu tænasturnar út á fleiri hendur. Biðið fyri samkomuni.

## *21. Leygardagur* *Es. 12.1-6*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen, Zephaniah 1**

Vit eru nú komin upp á pláss og eru farin at læra mál og mentan. Toymið á staðnum stuðlar okkum væl, og vit læra nógv av grannum okkara. Biðið, at vit fáa varandi uppihaldsloyvi og eru miðvís í arbeiði okkara.

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 11, Tabita 8, Debora 6, Natan 3**

★ Í dag fyllir Rio Mortensen 3 ár

## *22. Sunnudagur* *Róm. 9.14-33*



### ONGLAND, Taunton
### Dorit og Simon Marshall

Vit vóru á árligu ECM-stevnuni í Eysturríki. Simon ferðaðist nógv í apríl mánaði, tá hann m.a. vitjaði trúðboðaran Roman í Lviv í Ukraina. Roman stendur fyri vandamiklu tænastuni í Lviv, har hann m.a. hjálpir ukrainum at flýggja. Síðst í apríl var Simon í Reykjavík saman við trúboðarum, ið hava í huga at virka har. Biðið, at Harrin hjálpir tænarum sínum.

### SVEIS, Versoix, Redeemer Grace
### Jeanette og Solomon Magura
### Reuben 8, Micah 8

Vit hildu páskahátíð saman sum samkoma. Í mars mintust vit trúfesti Harrans, nú Redeemer Grace fylti sjey ár. Vit kundu tá aftur hava máltíð saman. Vit gleða okkum til samkomuleguna 11-13. juni.

⋆ Í dag fyllir Judah Flanagan 7 ár

## *23. Mánadagur* *Es. 13.1-22*



### FILIPSOYGGJAR
### Puerto Prinsessa
### Cathy og Jógvan J. Rasmussen

Eg rættlesi umseting av Fyrru Krønikubók til eitt av mongu málunum í Papua Ný Guinea.

⋆ Í dag fyllir Nya Flanagan 14 ár

⋆ Í dag fyllir Hanna Sharp 14 ár

## *24. Týsdagur* *Róm. 10.1-21*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 14, Noah 13, Karis 8,**
**Judah 7, Ethan 4**

Í fimm mánaðir hava vit hjálpt til í leiðsluni á trúboðarastøðini, men 27. apr. fara vit innaftur í Lele ættarbólkin. Vit fyrireika farloyvi í nov. í ár. Biðið fyri mengensamkomuni – nøkur trúgvandi royna veruliga at fylgja Kristusi, men hetta kostar teimum í lokalsamfelagnum. Týsku lærararnir hava roynst sera væl.

## *25. Mikudagur* *Es. 14.1-23*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 5, Jude 3, Evelyn 2**

Sonurin Jude hevur havt astma síðstu tvey árini, men enn vantar neyv útgreining. Vit skulu nú til serlækna, sum vónandi finnur svarið, vit leita eftir, áðrenn vit fara til PNG í januar



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 17, Hanna 14**

⋆ Í dag fyllir Noah Berghamar 16 ár

## 26. Kristi himmalsferðardagur — Áp. 2.1-21

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 13**

Vit eru takksom fyri góðan túr í Guinea. Vit vitjaðu í einum ættarbólki, har Marion legði lag á at læra málið. Síðani vóru vit eina viku í Tarensa. Sonurin Andrew og kona hansara vitja okkum seinast í mánaðinum. Vit taka farloyvi í seks mán. Biðið fyri arbeiðnum her, meðan vit eru burturstødd.

## 27. Fríggjadagur — Áp. 2.22-47



**ÍSLAND, Reykjavík**
**Kristín Gerðalíð**

Eg gleðist um starvið á Hótel Ørkini. Eg og ein vinur fyrireika arbeiði millum lesandi á Háskóla Íslands í heyst. Har ganga 15.000 næmingar. Biðið, at Gud kallar íslendsk trúgvandi at luttaka, og at íslendingar koma til trúgv.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## 28. Leygardagur — Róm. 11.1-21



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Tilfarið er prentað, og tíðin er komin at vitja samkomur og læra út frá Ápostlasøguni. Eg noyddist heim aftur fyrr enn ætlað, tí Liz gjørdist sjúk. Biðið fyri verkinum millum kankanaeyfólkið.

## 29. Sunnudagur — Es. 14.24-32



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 17, Aron 10, Noah Kristian 8**

Tænastan er vaksin, og vit hava nú 30 starvsfólk í trimum ymiskum býum. Biðið fyri *The Well International*.

## 30. Mánadagur — Róm. 11.22-36



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 12, Nana 10, Louie 8, Rio 3**

Fyri at gera tað léttari at bjóða øðrum í samkomuna arbeiða vit við at tillaga sangstílin og tónleikin. Biðið um vísdóm og Guds leiðslu.


**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087
**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Teldupostur** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo


NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**450 síður 190 kr.**




Í 1563 byrjaði John Foxe at skriva um trúgvandi, sum høvdu liðið blóðvitnisdeyða fyri trúgv á Kristus. Frá Stefanusi, fyrsta blóðvitninum, greiðir Foxe frá kristnum, sum vórðu dripin heilt fram til samtíð hansara undir drotning Mary I í Bretlandi, kend sum *Bloody Mary*. Bókin er dagførd fram til ár 2000. Foxe ynskti, at samkoman skuldi minnast blóðvitnini, tí hann var sannførdur um, at teirra blóð er sáðið, sum fær samkomuna at vaksa og mennast. Nógvastaðni í heiminum eru enn kristin, sum líða og verða dripin, tí tey ikki vilja avnokta Jesus. Fleiri kristin hava liðið blóðvitnisdeyðan seinastu 100 árini enn fyrstu 1900 árini av samkomusøguni. Lat trúgv teirra eggja okkum at standa føst í trúnni.

Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið týs.-frí. kl. 14.00-17.30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo